## Bogi í fokus

Tað er ikki bara í Eysturríki, at Bogi Løkin hevur sett seg sjálvan ovast á breddan. Longu til fyrstu venjingina mánakvøldið vóru litavisk tíðindafólk á staðnum, og tað var eingin ivi um, hvønn hesi vildu tosa við. Málið leygardagin og ættarbondini mótvegis Landskrona-hetjunum eru mest ævintýrakend elementir hjá útlendsku miðlunum, og fryntligur sum altíð gav Bogi sær góðar stundir at svara spurningunum, sum vórðu settir.



## Landshetja sum ferðaleiðari

Tað er ein fyrrverandi litavisk landsliðshetja, sum í hesum døgum stendur fyri koyring og ferðing annars hjá føroyska landsliðnum. Richard Ludvig er kongaliga og eisini ó-litaviska navnið á manninum, sum nú er farin um tey 40, men sum fyri nøkrum árum síðani var ein av berandi kreftunum á litaviska liðnum. Eitt nú var hann partur av liðnum, sum á heysti í 1990 spældi óvæntaðan javnleik móti nýkosnu europameistarunum úr Danmark.

# Eitt stórt bonus

**Ingi Højsted hevur fingið enn eitt kappingarár mest sum oyðilagt av skaðum. Seinastu mánaðirnar hevur hann tó spælt, og hann metir landsliðsúttøkuna sum eitt stórt herðaklapp**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Seinasti maðurin, sum varð kallaður til seinasta landsliðshópin hjá Jógvan Martini Olsen var Ingi Højsted úr B36.

Ingi var ein av spælarunum, sum Jógvan Martin Olsen ætlaði í avgjørdan lyklaleiklut, tá hann tók við sum venjari, men alt fyri eitt fóru skaðar at arga. Í vár var Ingi tó aftur við í hópinum, sum tá fór til Íslands, men síðani hava skaðar aftur steðga unga B36'aranum, sum trý tey seinastu kappingarárini hevur verið skaddur heilt stóran part av tíðini.

Tí var tað eisini ein sera fegin Ingi Højsted, sum tók ímóti landsliðsboðunum sunnudagin.

- Eg hevði als ikki roknað við at verið aftur í hópinum í ár, so hetta taki eg sum eitt stórt bonus. Eg eri sum so ikki komin veruliga fyri meg enn, men seinastu dystirnar hevur gingið alsamt betur, og móti EB/Streymi seinast spældi eg allar 90 minuttirnar, sigur Ingi Højsted.

- Mítt mál hevur meira verið at koma veruliga fyri meg næsta ár, so hetta taki eg meira sum eitt stórt bonus.

Og væntar tú at koma á vøllin undir dystinum mikukvøldið.

- Tað veit eg ikki. Nú eri eg fyrst og fremst við sum gardering á miðvøllinum, so tað vænti eg ikki sum so. Men eg vóni sjálvandi at eg sleppi inn, og tað hevði í øllum førum verið ótrúliga stuttligt, sigur Ingi Højsted.




*Triðja árið á rað er kappingarárið hjá Inga Højsted mest sum oyðilagt av skaðum, og tí var hann sera fegin um landsliðsboðini, sum hann fekk sunnudagin*

## Blundaði undir dýnuni

**Símun Samuelsen var sera fegin um avrikið hjá liðfeløgunum leygardagin. Sjálvur lág hann tá sjúkur í seingini, og seinastu minuttirnar tordi hann mest sum ikki at hyggja**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Meðan liðfelagarnir stríddu seg til eitt stig í dystinum móti Eysturríki, var Símun Samuelsen eftir á Hotel Føroyum.

Bruni gjørdi um seg í hálsinum, og tí var ikki hugsingur hjá Símuni um at vera partur av hópinum, men hann ásannaði mánadagin, at hann var ovurfegin um úrslitið.

- Hatta var fantastiska stuttligt at hyggja eftir, men samstundis var tað óhugnaliga spennandi. Eg lág jú einsamallur á Hotel Føroyum, og eg haldi, at seinastu 10 minuttirnar lág eg bara undir dýnuni.

Mánadagin var Símun tó við í landsliðsferðalagnum, og hann sigur seg vilja stríðast fyri at endurvinna plássið.

- Eg mundi taka eini tvær penicilin-tablettir eyka, tá hatta úrslitið kom heim. Nú gongur í øllum førum betur, og so má eg bara stríðast fyri mínum plássi. Hatta úrslitið staðfestir í øllum førum, at eingin kemur inn á liðið uttan víðari, og soleiðis skal tað eisini vera, sigur Símun Samuelsen.



*Símun prátar her við Christian Lamhauge Holst á flogvøllinum í Vilnius*

# Til reiðar til miðvøllin

**Fróði Benjaminsen staðfestir, at uppgávan mikukvøldið verður hørð, men saman við liðfeløgunum er hann til reiðar at gera sítt besta. Líka mikið um hetta verður í verjuni ella á miðvøllinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Fyri fyrstu ferð í fleiri ár var Fróði Benjaminsen á landsliðsbeinkinum, tá dysturin móti Eysturríki varð blástur ígongd. Tað gingu tó bert 36 minuttir, áðrenn boð vóru eftir honum, og avrikið leygardagin saman við skaðanum hjá Mikkjali Thomassen bera við sær, at lítil ivi er um, at Fróði verður á føroyska miðvøllinum frá byrjan mikukvøldið. Ein uppgáva, sum spælarin sjálvur er púrasta til reiðar at taka á seg.

- Um tað er brúk fyri mær á miðvøllinum, so eri eg sjálvandi tendraður til at fara har at gera mítt besta. Og tað eri eg sjálvandi eisini í verjuni.

*Tit spældu javnt móti Eysturríki leygardagin, og tað er sjálvandi flott í sjálvum sær. Men ræður kanska fyrst og fremst um at fáa armarnar niður nú?*

- Dysturin móti Eysturríki er farin, og nú er tað Litava, sum vit skulu fokusera uppá. Og har vilja vit sjálvandi eisini royna at fáa eitt gott úrslit. Og í øllum førum gera alt tað, sum vit eru mentir.

*Men tað er væl eingin loyna, at sjálvsálitið er betri eftir ein slíkan dyst sum tann móti Eysturríki?*

- Avgjørt. Nú hava vit ikki fingið nakað stig í fleiri ár, so fyri sjálvsálitið var tað sera gott, at tað loksins eydnaðist, sigur Fróði.

Føroyska landsliðið hevur tríggjar ferðir áður spælt í Litava. Hvørja ferð hevur talan verið um øgiligt trýst, og Fróði, sum hevur verið partur av tveimum av hesum dystum, roknar ikki við nøkrum undantaki hesaferð.

- Tað verður ein trupul dystur. Tað er eingin ivi um tað. Men samstundis, so mugu vit fara út at gera okkara besta, og so vóna, at teir ikki hava ein av sínum allar bestu døgum, sigur Fróði Benjaminsen.

*Fróði í gongd við at strekkja út undir løttu venjingini mánakvøldið*

